## DAGSINS MEINING

# Almennar starvssetanir

Eftir úttalilsum hjá løgmanni er greitt, at meira verður ikki gjørt við landsantikvarsetanina. Løgmaður hevur kapitulerað yvirfyri varaløgmanni, ið sigur, at alt er farið rætt fram, og tí verður áheitanin frá starvsfólki, Magistarafelag og løgmanni sjálvum um at ógilda setanina ikki tikin til eftirtektar. Hetta merkir, at starvsfólkapolitikkurin, ið varð so týdningarmikil fyri løgmann, at hann koyrdi landsstýriskvinnu úr starvi, eftir øllum at døma ikki er verdur pappírið, hann er skrivaður á. Tað, ið løgmaður gjørdi til eitt álvarsligt prinsippmál, hevur hann nú sjálvur punkterað.

Høgni Hoydal, virkandi landsstýrismaður í mentamálum, hevur sagt, at alt fór rætt fram í landsantikvarsetanini, hóast tað er staðfest av eitt nú løgmanni, at so var ikki. Hóskandi kundi tí verið at spurt HH, um tað er í lagi at skriva setanarfráboðan á heimatelduni uttan brævhøvd, journalnummar ol. í álvarsmáli, ið hevur við umsøkjarar til alment starv at gera? Er tað í lagi, at ein, um ein skal trúgva undanfarnu landsstýriskvinnuni í mentamálum, einsamøll landsstýriskvinna uttan fakligan førleika skal hava setanarsamrøður og vurdera umsøkjarar? Er tað í lagi at koma við nýggjum førleikakrøvum, ið ikki stóðu í starvslýsingini? Sambært formanni Tjóðveldisfloksins er svarið ja til omanfyristandandi spurningar. Vit kunnu bara staðfesta, at alt tos um at arbeiða eftir bókini og klokkuklárum mannagongdum eftir hetta fer at ljóða heldur tómligt.

Hetta er flokkurin, ið stendur á odda at vilja yvirtaka løgreglu og rættarskipan. At hugsa sær, um talan nú ikki var um landsantikvar, men um starvssetan av fúta ella dómara. Kunnu vit í Føroyum liva við, at ein flokkur fer so lætt um setanarpolitikkin? Løgmaður hevur ein trupulleika, um hann letur hetta ganga.

Hvussu fer eitt framtíðar landsstýrisfólk at handfara eina møguliga fútasetan ella dómarasetan? Hetta er sera álvarsligt. Tað er beinleiðis vandi á ferð, um serfrøðin tá verður lopin um til frama fyri til dømis brøv frá fólki, ið vilja hava beinleiðis ávirkan á, hvør skal sita í landsins hægstu størvum og meira týdningarmikið, hvør eftir øllum at døma ikki skal sita í landsins hægstu størvum.

Málið snýr seg um trúvirði. Trúvirðið hjá setanarpolitikkinum er rokið, um løgmaður ikki fylgir málinum til dyrnar. Endar málið her eigur samgongan at broyta setanarpolikkin, so hann er í tráð við veruleikan. So kann setanarpolikkurin reduserast til nakrar fáar linjur um, at landsstýrisfólkið ger, sum tað vil, uttan atlit til ráðgeving og førleikakrøv. Nøkur orð kunnu so skoytast uppí um, at førleikakrøvini kunnu tilpassast, aftaná umsóknirnar eru komnar inn, so fólk kunnu kasserast í síðstu løtu, uttan at tað er tráð við starvslýsingina. Syrgiligt, um føgru orðini um gjøgnumskygni og rættvísi í starvssetanarpolitikkinum nú fara fyri einki, áðrenn hesin politikkur veruliga er farin at virka. Anfinn Kallsberg, løgmaður hevur ein stóran trupulleika. Hann tók eina álvarsliga avgerð, tá hann ikki tolereraði brot á starvsfólkapolitikkin. Men hvat nyttu ger hon, um løgmaður ikki letst um vón, tá nýggi landsstýrismaðurin ikki vil rætta gjørd mistøk.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Út av lagið vánalig viðferð av fremmandum

**Tróndur Skaalum**

Eftir at hava lisið sosialin 15-03-03 og skilt, hvussu illa fyri vit í Føroyum eru, tá vit skulu handfara innflytarar úr øðrum londum. Nevnda Rosalie Thomsen er gloppin ímillum onkra paragraf ella vánaligt orðað útgreining av uppihaldsloyvi og arbeiðsloyvi. Fyrst og fremst hevur hon ikki fingið røttu viðgerð í Danmørk, men heldur skeiva lýsing av umstøðunum. Og síðani eftir at vera komin til Føroyar handtikin og borin til politistøðina, sum ein hvør kriminellur, í tríggjar tímar einsamøll undir stressi berandi barn í sjeynda mánaði. Heini og Rosalie Thomsen hava annars sett seg í samband við fúta og hava greitt frá støðu síni hjá politinum.

Eru vit í Føroyum blivin óð í høvdinum!? Tað hóskar seg rætt, at ábyrgdarin fyri útlendingastýrinum tekur seg saman og loysir málið alt fyri eitt. Givið kvinnuni, sum er gift við føroyingi, eitt uppihaldsloyvi beinanvegin saman við arbeiðsloyvi. Alt bendir á, at vit føroyingar als ikki eru mentir at loysa nakran trupulleika sjálvir, men rena hjúnini beint til danmarkar aftur við sínum tveimum børnum, ella eru vit? Politiið hevur annars bert sitið á síni fløtu; ringt til mynttelifonina á Bládýpinum har tey búðu fyrstu tíðina og so ikki meir.

Eg skammist av okkum føroyingum at rena familju, sum er føroysk, av landinum í køldum hjarta ímeðan vit annars hava nógvar stakar útlendingar, ið eru her bert fyri arbeiði. Vit eiga í øllum førum at taka hesi hjún í álvara og viðfara tey sakliga, og geva teimum sama møguleika, sum vit vildu, at onnur skuldi givið okkum sjálvum. Hóast hettar skuldi alt verið óneyðugt, tí maðurin hjá hesi kvinnu er føroyingur.

# Minningarorð um Trónd Udbø Petersen

**Góði Tróndur**

Tað var okkum øllum ein syrgin dagur, tá ið boðini komu, um at tú ikki longur skuldi vera ímillum okkum. At tú so brádliga skuldi fara, tykist so órímiligt og óveruligt, tá ið tú átti at havt so nógv ár fyri framman. Tú hevði so nógv í væntu og so nógv meira at geva, men hóast tú bert hevði sett tíni spor í heimin í 19 ár, so vóru hesi spor sera djúp, og hevur tú skapað ógvuliga nógv góð minnir fyri øll menniskju, sum tú hevur hitt á tíni stuttu, men gevandi lívsleið.

Eitt tað størsta, sum eyðkendi teg, var títt blíða og vinarliga smíl. Altíð hevði tú eitt smíl at geva, sum hevði eina positiva ávirkan á onnur. Altíð dugdi tú so væl at síggja, hvør hevði brúk fyri tær, og altíð gavst tú eina hjálpandi hond, til tann, ið trongdi til hana. Tú hevði eygað, sum sá, og eitt hjarta sum gav.

Altíð hevur tú verið tín egin; tú hevur ongantíð verið bangin fyri at vera TÚ, og hevur tú uppiborið nógv rós fyri hetta. Ein kann bara siga góð orð um teg; altíð hevur tú havt eitt sera gott, vinaligt og stórt hjarta, sum hitaði øll menniskju, tú kom framvið. Tú hevði so stórt hugflog, og var tað á heilt ungum árum, at tú vísti tínar listarligu eginleikar, sum settu sín dám á tað, sum tú stóð inn fyri. Hesir góðu eginleikar vóru eisini við til, at tú fyri stuttum varð útlærdur sum hárfríðkari við sera góðum úrslitum.

Nógvar góðar løtur høvdu vit saman í skúlanum. Meðan vit hugsaðu um okkara framtíðar ætlanir, so visti tú altíð hvørja leið tú skuldi taka. Ístaðin fyri at fylgja streyminum og fara á studentarskúla, so fylgdi tú hjarta tínum og fór, sum sagt, á hárfríðkanarskúla, og vann stórt.



Sjálvt um vit úr hoyvíkarskúlanum ikki eru saman longur sum fyrr, fara vit øll at sakna teg. Men saknur okkara kann tó ikki samanberast við tann sakn, familja tín hevur, og tí fara okkara bestu ynskir heim til teirra. Tú er og fer altíð at vera ein sonn fyrimynd.

Vit síggjast!
**Floksfelagirnir úr Hoyvíkarskúla**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Fyrispurningur til Bjarna Djurholm

**Katrin Dahl Jakobsen**



Soljóðandi fyrispurningur er settur Bjarna Djurholm, landsstýrismanni viðvíkjandi Ytra Ringvegi í Havn:

1. Hvussu stór er dagliga ferðslan til og úr Havnini eftir Hvítanesvegnum?
2. Nær er ætlanin um Ytra Ringveg upprunaliga stungin út í kortið, og hvussu er hendan loysnin komin í lag?
3. Heldur landsstýrismaðurin júst hesa loysnina vera tað bestu fyri landið og Havnina?
4. Hevur landsstýrismaðurin gjørt nakrar útrokningar um kostnað av tunnilsgerð ístaðin fyri ætlaða ringvegin ella landsins part av Ytra Ringvegi?
5. Um ikki, fer landsstýrismaðurin at taka stig til slíka kanning?
6. Sær landsstýrismaðurin nakrar fyrimunir við tunnli heldur enn vegi, tá hugsað verður um íløgu, viðlíkahald, trivnað og umhvørvi fyri verandi og komandi býlingar í hesum økinum?
7. Fer landsstýrismaðurin at taka upp málið um Ytra Ringveg í Havn av nýggjum við kommunala myndugleikan, við tí fyri eygað at endurskoða ætlanina?
8. Ella er hetta strekkið partur av teirri endurskoðan av samferðslukervinum, sum landsverkfrøðingurin er farin undir, sum boðað varð frá í tinginum og sum tí er orsøkin til, at verklagslógin ikki kom í hesi setuni?

Í viðmerkingunum til § 6 í fíggjarlógini, har ein av postunum er nýggir landsvegir, stendur soleiðis: »Sum er fer ferðslan til og úr Tórshavn eftir Hvítanesvegnum gjøgnum Hoyvík. Orsakað av vaksandi fólkatalinum í høvuðsstaðnum, og vaksandi ferðsluni í samfelagnum sum heild, fer trýstið á hetta vegastrekkið, sum longu er mest trafikerað landsvegur, væntandi at vaksa komandi árini. Fyri í størri mun at leiða ferðsluna uttanum bygt øki, verður nýggjur vegur gjørdur úr Sandvíkum gjøgnum Hoyvíkshagan til íbinding við Oyggjarvegin.

Verkætlanin verður framd í samstarvi við Tórshavnar kommunu, og verður landsins partur av samlaðu verkætlanini framdur í tveimum stigum. Fyrsta stig verður ætlandi frá Oyggjarvegnum til á leið Millum Gilja, og kommununar partur verður víðari frá Millum Gilja til Sandvíkar. Henda verkætlanin ger tað møguligt at taka vegin í nýtslu í 2006-2007. Landið kann so, tá rúm er á íløguætlanini, fara undir næsta byggistig frá Millum Gilja til íbinding í landsvegin millum Havnina og Kollafjarðartunnilin. Tá verður alt vegastrekkið vanligur landsvegur, og kommunali parturin av upprunaligu verkætlanini verður tá ein vanlig kommunal íbinding í landsvegin.

Kostnaðurin av fyrsta stigi verður væntandi uml. 30-35 mió. kr. Verður avgerð tikin um at fremja næsta byggistig eisini, verður kostnaðurin av hesum uml. 35-40 mió. kr. Samlaði kostnaðurin av verkætlanini verður tá 65-70 mió. kr«.

Harafturat sigur landsstýrismaðurin í somu omanfyri nevndu viðmerkingum, at »játtaðar verða 1 mió. kr. í ár, so farast kann undir verkætlanina í 2003, og at ætlanin er at leggja verklagslóg fyri tingið í hesi tingsetuni, har greitt verður frá verkætlanini».

Í flestu londum er stórt ferðslutrýst á høvuðsstaðirnar. Havnin er einki undantak í so máta. Tvørturímóti man trýstið á Havnina vera lutfalsliga størri í mun til støddina enn nógva aðrastaðni. Tað eru longu nógv ár síðan, at menn komu eftir, at tunnil man vera frægasta, munabesta og minst órógvandi loysnin, til tess at leiða ferðslu gjøgnum býir. Hetta síggja vit allastaðni og ikki er neyðugt at fara víða um, fyri at sannføra okkum um, at so er. Framkomin tøkni og amboð hava gjørt tað munin lættari og helst eisini bíligari at bora tunnlar, enn tað var fyri bara fáum árum síðani.

Hjá okkum hevur kjakið um tunnilsgerð mótvegis vegagerð umsíður veruliga tikið seg upp. Í løtuni eru verkætlanir um tunnil millum Øravík og Hov og við Leirvík. Tó er henda seinna verkætlanin meira sambærlig við tað, hesin fyrispurningurin snýr seg um.

Tað er sera umráðandi, at íløgur landsins eru so væl umhugsaðar sum yvirhøvur til ber. At vit í allari fyrireiking bera so í bandi, og at hesar sum frá líður gerast dygdargóðar bæði fíggjarliga, umhvørvisliga og trivnaðarliga. Tað er einki at taka seg aftur í, at serliga fyrsta byggistig av Ytra Ringvegi, sum landið við tað fyrsta skal fara undir, átti at verið kannað nærri. Tað at gera ein ringveg rundan um alla Havnina, skal hesin ganga eftir lendinum, er í sjálvur sær ivasamur, havandi í huga hvussu lítið uppland er eftir rundan um høvuðstaðin, og hvussu trongt tað er frá fjalli til fjøru sæð í mun til samlaðu ferðsluna.

Varð so stórur partur sum til ber lagdur í tunnil av teininum frá Oyggjarvegnum ella Marknagili til Millum Gilja og kanska til Sandvíkar við, hevði tað, eins og í Leirvík, spart okkum fyri at tikið av avmarkaða lendinum, og ferðslan í størri mun verið leidd uttanum bygt øki, sum endamálið jú er sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini. Ferðslan hevði órógvað minni, viðlíkahald verið ódýrari, og vit høvdu sloppið undan kavarudding. Grótið úr tunnlinum høvdu vit spart til ta rest, sum varð av vegagerð. Spurningurin er, um vit í longdini ikki høvdu vunnið inn aftur slíka íløgu, heldur enn at leggja nýggjan stóran landsveg so ovarlaga og so skemmandi fyri umhvørvið.

Tá spurningurin um fast samband um Skopunarfjørð var umrøtt í tinginum herfyri, segði landsstýrismaðurin, at landsverkfrøðingurin er farin at endurskoða alt samferðslukervið bæði á landi og undir sjónum.

Tá eingin verklagslóg fyri Ytra Ringveg kom í hesi tingsetuni, sum lovað varð í viðmerkingunum til fíggjarlógina, og einki frættist um hetta málið yvirhøvur, verða hesir spurningar settir fram. Kann vera, at orsøkin er hon, at henda verkætlan telist millum teirra, sum landsstýrismaðurin og landsverkfrøðingurin eru farnir at umhugsa av nýggjum.

# Spurningur um MVG-lógina

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



Spurningur til Karsten Hansen, landsstýrismann viðvíkjandi løgtingslógini um meirvirðisgjald

1. Nær kann roknast við at eitt uppskot um endurskoðan av mvg-lógini verður lagt fyri tingið?
2. Hvussu stór er samlaða eftirstøðan hjá teimum, sum skylda landskassanum meirvirðisgjald?
3. Hvørjar fylgjur fær tað fyri virkir og fyritøkur, um tey skylda meirvirðisgjald?
4. Hvussu stóran part av eftirstøðuni av meirvirðisgjaldi metir landsstýrið, at møguleiki er fyri at fáa inn?

Lógin um meirvirðisgjald (tann sokallaða mvg-lógin) er broytt við ikki færri enn 21 løgtingslógum og 15 kunngerðum, síðani hon varð sett í gildi í 1992. Úrslitið av hesum er, at vit í dag hava eina ógvuliga fløkta og útholaða lóg, sum treingir harðliga til at verða endurskoðað.

Upprunaliga var ætlanin við lógini, at eingi undantøk skuldu gerast, men sum árini eru gingin, eru undantøkini bara blivin fleiri og fleiri.

Karsten Hansen, landsstýrismaður, hevur havt ta prinsippiellu støðu, at hann hevur verið ímóti, at fleiri undantøk verða gjørd í mvg-lógini. Tá uppskot hava verið løgd fyri tingið um fleiri undantøk, hevur hann mælt tinginum frá at samtykkja tey, og hevur víst á, at øll lóggávan eigur at verða endurskoðað. Tó gekk Karsten Hansen sjálvur beint í móti hesi prinsippiellu støðu, tá hann í november 2002 legði fyri tingið uppskot um at geva P/f Vágatunlinum undantaksloyvi frá at skula gjalda meirvirðisgjald av ferðaprísinum undir Vestmannasund.

Tað kann vera skilagott at endurskoða alla mvg-lógina, men so er eisini neyðugt at eitt ítøkiligt uppskot kemur í tingið um hetta.

Í samgonguskjalinum stendur, at meirvirðisgjaldskipanin skal endurskoðast, men hetta stóð eisini í samgonguskjalinum frá 1998, og tá hendi einki.

Nógv hevur verið tosað um hesa endurskoðan í fleiri ár, serliga tá andstøðuuppskot um meirvirðisgjald hava verið viðgjørd í tinginum. Tá hevur mangan verið ført fram, sum ein afturvendandi grundgeving fyri at fella málið, at rættast var at endurskoða alla mvg-lógina. Men enn hevur einki verið at sæð til nakað uppskot hesum viðvíkjandi, og tí verður nú spurt, um nakað uppskot er á veg.

Ein møguleiki hevði verið at gjørt eina líknandi skipan sum Ísland hevur, har meirvirðisgjaldskipanin eingi undantøk hevur, men allar vørur verða býttar í tveir bólkar (vanligar vørður og neyðsynjarvørur). Pengakassarnir í handlunum eru programmeraðir soleiðis, at teir automatiskt skilja ímillum hesar vørubólkar. Á tann hátt er lógin munandi lættari at umsita enn okkara lóg.

Fyri fáum døgum síðani bórust tíðindini um, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum ætlar at biðja Løgtingið um loyvi til at strika skuld fyri fleiri hundrað milliónir krónur, sum tað almenna eigur til góðar úti í samfelagnum. Ein partur av hesum milliónum er meirvirðisgjald, sum virkir og fyritøkur hava kravt inn frá sínum kundum, men tó ongantíð goldið víðari til lands kassan.

Talan kann neyvan vera um virkir, sum ikki eru til longur, tí í slíkum føri hevði ikki verið neyðugt at biðið Løgtingið um heimild til at strika skuldina.

Tí verður spurt, hvussu stór samlaða eftirstøðan er hjá teimum, sum skylda landskassanum meirvirðisgjald, hvørjar fylgjur fær tað fyri hesi, at meirvirðisgjaldið ikki er goldið, og hvussu stóran part av eftirstøðuni av meirvirðisgjaldi metir landsstýrið, at møguleiki er fyri at fáa inn.